


www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 10 - 2011

# Dong keypt bretskt gassfelag

Danska Dong Energy hevur keypt bretska gasshandilsfelagið Shell Gas Direct frá Shell í Bretlandi fyri 260 milliónir krónur. Shell Gas Direct letur umleið 2,5 milliardir rúmmetrar av náttúrgassi um árið og er eitt tað størsta av sínum slagi í Bretlandi. Umleið 100 fólk arbeiðs hjá felagnum, sum hevur umleið 11 prosent av bretska vinnumarknaðinum. Frammanundan er Dong Energy virkið í Bretlandi við havvindmyllum og einum orkuverki, samstundis sum felagið er við í olju- og gassleiting har. Við at keypa Shell Gas Direct hevur danska felagið tryggjað sær allar liðirnar á marknaðinum. Handilin skal tó fyrst fyri kappingarmyndugleikarnar hjá ES. Umleið 6.000 fólk arbeiða hjá Dong, og í fjør umsetti felagið fyri 55 milliardir krónur.